Danska Bodilvirðislønin handað

# Drápið enn eina stóra virðisløn

**Herfyri var so aftur stóra Bodil-heiðurslønarhandan í Imperial Biografinum í Keypmannahavn. Her heiðrar danskur filmur seg sjálvan, men spurningurin er, um tað eru so nógv at gleðast um innan danskan film fyri tíðina. Spurningurin er, um Danmark hevur so nógv at gleðast um í hesum døgum. Ikki bert vegna Muhammed kreppuna, men tí nógvir danskir filmar eru vánaligir.**

BODIL
*Kim Simonsen*

Fyri besta kvinnuliga leikaran, her vann Charlotte Fich, fyri filmin Drabet, men meðan øll væntaðu, at Pernille Valentin Brandt fór at vinna fyri Nordkraft. Eingin var to í iva, um at hin sera spennandi leikarin, Nicolas Bro, fór at vinna sum besti hjáleikarin fyri Voksne Mennesker og Adams Æbler.

### Og teir stóru

Trine Dyrholm fór við besta kvinnuliga leiklutinum i filminum Fluerne på væggen. Hin kendi leikarin, Jesper Christensen, vann ein Bodil fyri mannliga høvuðsleiklutin í Drabet. Hetta er fjórðu ferð, at Jesper Christensen fær hes virðislønina, tað eru bert Ghita Nørby og, hin nú farni, Frits Helmuth, ið hava fingið hetta fyrr. Christensen fekk hesa virðisløn fyri Hør, var der ikke en, som lo (1979) Barbara (1998) og Bænken (2001).

### Er nakað at gleðast um?

Fyri nøkrum árum síðani var eingin endi á hálovanini av donsku filmbylgjuni. Allur heimurin tosaði um "Festen", Dogme og handan løgna mannin, Lars von Trier. Í hesum døgum er vent í holini, og øll finnast at danska filmundrinum. Fólk kring heimin hava fingið nokk av danska filminum, ið hevur staði í stað í áravís. Danir gera film fyri at fáa 200.000 fólk at síggja hann, heldur enn at skapa okkurt, ið góðska er í.

Seinastu árini hevur danskur filmur verið ein stór útflutningsvøra. Danski stoltleikin yvir framgongdina innan film hevur verið stór. Tað er, sum heur danski samleikin fingið eina saltvatnsinsspræning av øllum hesum rósinum. Fyrr kendur øll LEGO, H.C. Andersen og nú eisini Dogme, Festen og allar hinar filmarnar.

Árini 1996-2002 vóru seks feit ár fyri danska filmin. Lars von Trier, Thomas Vinterberg og Nicolas Winding Refn vóru stjørnurnar í øllum hesum. Dogme var gandaorðið hjá hesi rørslu.

### Nú er ballið liðug

Nú er tað sum um ballið er buðið. Sjálvt Lars von Trier hevur sambært Dansk Filminstitut bert selt 12.600 atgongumerki til nýggja filmin "Manderlay", ið var frumframsýndur í Cannes í fjør. Ein løgin løtt komedia sum "Solkongen" hjá Thomas Villum Jensen hevur í mun til hetta selt 345.000 atgongumerki í 2005.

Nú tíma fólk ikki bert at síggja Birte Neumann, Nikolaj Lie Kaas, Paprika Steen, Mads Mkkelsen, Bjarne Henriksen, Ole Testrup, Thomas Bo Larsen, Søren Pilmark og Jesper Christensen í hvørjum filmi. Hin vegis hava vit sæð nógv nýggj andlit í seinastuni sum: Simon Dahl Thaulow, Vivian Wu, Signe Egholm Olsen, Claus Riis Østergaard, Thomas Corneliussen, Rudi Køhnke, Signe Vaupel, Tilly Scott Petersen, Lena Maria Christensen, Christian Tafdrup og onnur.



*Mordet gjørdist stóri vinnarin, tá danir um vikuskiftið høvdu árligu Bodil-handanina*

### Bille August

Í 2005 kom Oscar og Gullpalmuvinnarin Bille August at finnast at danska filminum Han helt m.a. fyri, at "Filmene ligner hinanden, skuespillerne udvikler sig ikke, og historierne er skrevet, så de går op rent dramaturgisk, men er uden indhold og noget oprigtigt ærinde ud over at underholde og tjene penge". Sjálvur hevur hann gjørt ein vánaligan film fyri og annan eftir, her seinast amerikanska filmin "Return to Sender", ið fekk vánalig ummæli í 2005.

Bille August helt fyri, at danir brúka bert somu sjónleikarnar og at hesi spæla sama leiklutin hvørjaferð. Ein kanning gjørd av felaginum Dicar, hevur staðfest at hetta passar. Í 102 donskum filmum ganga somu nøvnini aftur. Birete Neumann hevur t.d. spælt við í 23 av hesum filmum og Thomas Bo Larsen í 18. Lars von Trier fram við sama sjónarmiðinum. Hann helt, at tey sum skriva filmshandrit einsrætta danska filmin. Til hetta svaraði stjórin á Filminstituttet, at Lars von Trier er "urimeligt generaliserende og helt ude af trit med virkeligheden, når han kritiserer brugen af manuskriptforfattere i dansk film." Tað sum teir berjast um eru teir báðir Anders Thomas Jensen og Kim Fupz Aakeson, ið báðir hava skriva nærum allar danskar mainstream filmar seinastu árini. Trier helt um Anders Thomas Jensen og Kim Fupz Aakeson at teir skriva ópersónligt og grunnar filmar.

Beint áðrenn nevndin valdi at geva Per Fly Bodilvirðislønina fyri ársins danska film "Drabet" var enn ein rødd frammi, ið fanst at øllum projektinum hjá Per Fly. Í 2005 vóru teir kendu leikstjórnir Lars von Trier og Bille August eisini frammi við álvarsamum atfinningum av danska filmídnaðinum

## FAKTA

**BODIL VINNARAR**

**Besti danski filmur**
Drabet (Per Fly)

**Besti kvinnuligi høvuðsleiklutur**
Trine Dyrholm (Fluerne på væggen)

**Besti manligi høvuðsleiklutur**
Jesper Christensen (Drabet)

**Besti kvinnuligi hjáleiklutur**
Charlotte Fich (Drabet)

**Besti manligi hjáleiklutur**
Nicolas Bro (Voksne mennesker)

**Besti ikki-amerikanski filmur**
Der Untergang, Oliver Hirschbiegel, Tyskland

**Besti amerikanski filmur**
A History of Violence (David Cronenberg)

**Bodil fyri ársins myndamann**
Manuel Claro

**Serligur-Bodil**
Kim Foss og Andreas Steinmann fyri arbeiði teirra við NatFilm-Festivalinum


## Bátur til sølu



**Sierra 30 fót til sølu. Byggiár 2000. 1 ára gamal Volvo Penta 300 HK við DPH drevi, við dupultari stálskrúvu. Gongur 30 míl.**
**Báturin hevur alskyns hentleikar:**

- Bóvskrúvu
- Radara 16 fjórðingar
- GPS kortplottara
- Sjálvstýrara
- Oljufýr við klokku (Webasto)
- El-ovn til varma
- El-ovn kombineraður til spritt. 2 plátur
- Mikrobylgjuovn
- Køliskáp við frystara 12 Volt – 220 Volt
- Trykkvatnsbeholdara heitt og kalt vatn
- WC við el-tøming til septiktanga
- Brúsa til heitt og kalt vatn
- 3 stk el-lensipumpur
- El hydraulic flaprar
- El- automatic stabilisatorar
- 2 stks landstreymsløðarar
- Bjargingarbát til 6 persónar
- Gummibátur til 4 pers. Við 10 HK Honda 4-takt páhangara (óbrúktur)
- VHF Telefon
- 22' litsjónvarp 12 Volt – 220 Volt
- Flatskerm PVD 12 Volt
- Radio við fløguspælara
- El-ankar við fjarstýring – 50m keta
- 2 stk brandalarmar
- Presenning til flybridge
- Presenning til afturdekk
- Presenning runt um rútarnar og glashurð - óbrúkt
- Baðistigi til baðidekk
- Fjarstýrdur ljóskastari á targaboyla
- Nýtt avtakiligt borð til bakdekkið
- Mátta til dúrkið á bakdekkinum – óbrúkt.

**Báturin, sum er sera væl røktur, verður seldur um hóskandi boð fæst.**

**Sp/f Norðbil**
**Telefonnr. 31 37 07**